## Súni og teir vunnu aftur

Annan dystin á rað vann AaB í superliguni. Bert eitt mál kom í dystinum ímóti Silkeborg í gjárkvøldið, og tað var Poul Hubberts, ið skoraði hetta málið. Súni Olsen var við í AaB-hópinum, men hann sæt á beinkinum frá byrjan. Tá ið tað manglaði eitt lítið korter, varð Súni sendur á vøllin, og hann hevði eina góða roynd á málið. Jón Rói Jacobsen var ikki við, tí hann hevur ein skaða í knænum at stríðast við, og ivasamt er, nær hann kann spæla aftur.



## Alex fekk ein dag

Kappingarnevndin viðgjørdi á fundi hóskvøldið, hvørja revsing reyða kortið, sum Alex Jose dos Santos hjá B36 fekk í grannuppgerðini móti HB, skal hava við sær. Mikil øsing var um hetta reyða kortið, og niðurstøðan av viðgerðini hjá Kappingarnevndini var, at talan bert verður um tann eina leikdagin, sum reytt kort av sær sjálvum ber við sær. Harvið kann Santos ikki spæla við í dystinum ímóti EB/Streymi sunnudagin, men hann verður tøkur aftur til dystin mikukvøldið, tá GÍ vitjar hjá B36 í Gundadali.

# Tað verður stríð um dagsskránna

**Sjálvsálitið er stórt, og báðir partar hava nýggjar menn av Balkan, nú KÍ og HB við hvør sínum spælkonsepti fara undir fyrstu uppgerðina í Klaksvík eftir at fasta sambandið er vorðið veruleiki**

KÍ-HB
*Jóannes Hansen*



*Tað verður ein stórdystur av teimum góðu, gomlu, tá ið KÍ og HB spæla í Klaksvík sunnudagin. Roknað verður við sera nógvum áskoðarum*

Tað verður ógvuliga áhugavert í Klaksvík, har HB sunnudagin verður fyrsta felagið, ið fer at ferðast undir Leirvíksfjørð við tí fyri eyga at takast um stigini. KÍ er framvegis ósigrað, og fyri HB hevur tað stóran týdning, at teir ikki tapa og harvið smokkað sjey stig afturum klaksvíkingar.

– Vit fara norður fyri at fáa øll stigini. Sigurin á B36 næstsíðsta mikukvøld var sera týdningarmikil. Vit hava kós rætta vegin, og sjálvsálitið økist støðugt hjá ungu og evnaríku spælarunum. Hóast flestu teirra hava verið partar av besta liðnum í 2-3 ár, so hava teir ikki spælt serliga nógv. Nú hava teir fingið høvi at vísa, hvør dugur er í teimum, og teir hava tikið av.

Hetta sigur HB venjarin, Krzystof Popczynski, sum roknar við, at nógv HB viðhaldsfólk fara at fylgja sínum liði norður til Klaksvíkar. Stuðulsfelagið skipar fyri túri norður, og teir hava leigað seg inn í Atlantis undan dystarbyrjan og í hálvleikinum.

Allir HB spælararnir eru tøkir. Nýggjur er Jovan Radinovic-Panic, serbiski framrættaði miðvallarin, sum hevur vant í HB nakrar vikur, og sum HB heimasíðani veit at siga, at pappírini nú eru í lagi hjá:

– Hann verður við í Klaksvík. Um hann verður millum teir fyrstu ellivu, havi eg ikki tikið støðu til enn. Tað er góð kapping um plássini, sigur HB venjarin.

Sunnudagin vóru ábyrgdarmenninir fyri HB á Toftum, har teir vóru eygnavitni til sannførandi KÍ sigur.

Eftir fleiri trilvandi ár roynir HB aftur at finna gamla lagið við nógvum fólki kring bóltin, stuttum sendingum støðugum flytingum og skifti millum spæliøkir.

Í Klaksvík hevur annað konsept roynst væl higartil í ár. Íblásturin er stórur, nú teir við stórum fysiskum yvirskoti og longum og ofta høgum sendingum royna at toga spælið heilt út í borðini. Harvið er eisini longri millum teir innaru á vøllinum, enn tað er millum HB spælararnar. Mest sannførandi leikliga avrikið hjá KÍ higartil í ár var tað á Toftum síðsta sunnudag.

Sera áhugaverdi spurningurin undan sunnudegnum er tí, um tað verður KÍ, ella um tað verður HB, sum fer at seta leikligu dagsskránna hesa ferð og harvið, hvør tað verður, sum fer at renna aftaná hvørjum.

### Metið hótt

Í Klaksvík siga teir seg rokna við, at áskoðarametið stendur fyri falli. Tá ið KÍ í 1999 kappaðist við B36 um FM heitið, vóru 2130 gjaldandi eygnavitni til lyklauppgerðina í Klaksvík, tá ið B36 vitjaði.

– Eg havi roknað við tvey túsund áskoðarum, men nú eri eg farin at boygna. Eg rokni nú meiri við trý túsund áskoðarum. Havnarfólk skulu vera hjartaliga vælkomin. Vit fyrireika okkum at taka ímóti teimum. Okkara boð til teirra eru, at tey skulu hava gott fótbóltslag við norður, og at tey mugu fara frá húsum í góðari tíð. Tað vil siga tveir tímar undan dystarbyrjan.

Hetta sigur Palli Ziskason, stjóri fyri KÍ fótbóltinum. Í Klaksvík leggja teir plattar kring vøllin, so tað verður betri hjá teimum, sum tað ikki verður pláss fyri í skýlinum, at fylgja við. Løgreglan fer at hjálpa til at stýra ferðsluni. Sagt verður frá góðum veðri, so tað verður lag á manni hjá klaksvíkingum at lata bilarnar vera eftir við hús.

Bussar úr Havnini fáa parkeringspláss á stadionøkinum. Pláss er fyri bilum við eitt nú tekniska skúla, við fólkaskúlarnar og á útfyllingini á Vánni.

Í dag skuldi verjukendur spælari úr Serbia koma til Klaksvíkar. Talan er um 34 ára gamla Sinisa Jovanovic, sum royndarvandi har norðuri í fjúrtan dagar inntil fyri mánað síðani. Øll loyvi hjá honum eru komin í rættlag.

Ovi Nysted verður ikki við hesa ferð. Allir hinir KÍ spælararnir eru tøkir. Eisini Jan Andreasen og Steffan Kalsø, sum ikki vóru tøkir á Toftum.

STUTT SAGT

## Nú er verjan komin upp á pláss

**Móti B68 hava suðuroyingarnir møguleika fyri at sleppa burtur av niðurflytingarplássinum, sum teir higartil hava verið á**

VB/SUMBA-B68
*Jóannes Hansen*

Í VB/Sumba eru teir væl nøgdir við ferðina í Fuglafirði síðsta sunnudag. Úrtøkan var trý stig, og leikliga avrikið vísti, at teir eru á rættari leið.

– Alt avgerandi trupulleikin hevur higartil verið, at tað hevur verið so ótætt í verjuni. Avrikið í Fuglafirði vísti, at nú er munandi tættari har afturi. Ble røkir uppgávuna væl, og tað hevur stóran týdning, at Christian Soelberg er komin úr Danmark, sigur VB/Sumba venjarin Ole Andreasen.

Hjá VB/Sumba er manningarliga støðan betri nú, enn hon var í Fuglafirði. Hallur Dam Joensen og Jacob Skaaning, sum hava verið skaddir, eru tøkir aftur. Jón Krosslá Poulsen fekk løst í fótin undir venjing hóskvøldið, men teir rokna við, at hann verður førur fyri at spæla sunnudagin.

Á Toftum royna teir at koma fyri seg eftir dygga lúsingin á heimavølli síðsta sunnudag. Alex Troleis er leikbannaður eftir tvey kort og útvísing móti KÍ. Hollendski miðvallarin Ralph van Dooren er tøkur aftur, eftir at hann var leikbannaður síðsta sunnudag.

Talan er um lyklauppgerð. Um VB/Sumba fer at fáa fult, so lyfta teir seg upp um B68. Um toftamenn fáa fulla úrtøku, so verður munurin aftur til VB/Sumba fimm stig.